# hina vænastu rósuna



*Valborg Evi Johannesen og Leif Heimistovu Johannesen hava bæði lært nógv í undirvísingini*

## Teir 20 konfirmantarnir

**Pálmasunnudag verða hesir 10 dreingirnir og 10 genturnar fermd í Christianskirkjuni.**

Anni Absalonsen
Valborg Evi Johannesen
Elsebeth Arge
Ellingsgaard
Laura Bertholdsen
Maud Drayton
Karola Lydersen
Terja Ósá
Sofía Lind Rasmussen
Sofía Purkhús
Kristina Elsuba á Høvdanum
Ivan Joensen
Leif Heimustovu Johannesen
Ragnar Bjartalíð Danielsen
Bárður í Bø
Andri Hansen
Rasmus Steintórsson
Teitur Hansen
Karl Høgnesen
Bárður Hansen
Eivindur Eyðunsson

gjørdu teir eisini í gjár, tá vit vitjaðu í Christianskirkjuni.

Í gjár skuldu tey verða liðug við undirvísingina kl. 11, tí tá skuldu tey eta saman. Og tá talan er um tannáringar, so visti prestur hvat teimum dámar væl. Á matskránni stóð tí – ikki óvæntað – pizza.

Um vikuskiftið er ætlanin at tey skulu fara á legu saman norðuri í Gjógv. Har skulu tey yvirnátta eina nátt.

### Góður sálmur

Hóast Valborg ikki er liðug at ganga til prest, so hevur hon longu skilt nógv av tí, sum konfirmatiónin er. Tey hava lært, at konfirmatiónin merkir at siga ja til dópin.

Fyri hana er eingin ivi um, at undirvísingin hevur verið sera áhugaverd, og at prestur hevur dugað væl at greitt teimum frá øllum tí, sum hoyrir til konfirmatiónina.

– Vit hava lært nógv um Gud og um Jesus, og um fleiri av persónunum ein kann lesa um í Bíbliuni.

– Og so hava vit eisini hava fleiri av sálmunum í sálmabókini. Her dámdi mær serliga væl tann seinasta sálmin, vit hava lært – Hin vænasta rósan. Eg haldi, at hann var nokkso góður, sigur Valborg.

Tað var eisini hesin sálmurin, sum tey høvdu fyri hesa løtuna, vit vitjaðu í kirkjuni.

### Hvat trúgvin er

Valborg gleðir seg til konfirmatiónsdagin um eina góða viku.

Hon væntar nógv fólk, bæði úr Norðoyggjum og úr Suðuroynni, hagani hon er ættað.

Men Valborg er eisini greið yvir tann týdningin sum játtanin í sambandi við sjálva konfirmatiónina hevur – og fer at hava fyri hana.

– Eg havi lært, hvat tað vil siga at trúgva á Gud og Jesus, sigur hon.

Og tað er ikki so lítið!



*Tey hava sálmaørindi fyri – Hin vænasta rósan er funnin. Væl liggur fyri at læra uttanat – og at frambera tað hart, væl skiljandi og sannførandi*